

## Metall er gull vert

Prísirnir á ymsum metallum eru tey seinastu árini fleirfaldaðir, serliga er tað búskaparliga framgongdin í Asiu, sum ger at eftirspurningurin er vaksin so nógv. Nú sær tað út til, at prísurin aftur er komin í eina fasta legu. Tað, at metalprísirnir eru so høgir, ger at burturkast kopar, aluminium og stál eisini hevur góðan prís, tí tað verður smeltað umaftur. Sum dømi kann nevnast, at fyri eitt tons av burturkasti, kundi tú fyri fáum árum síðan fáa 5-600 krónur, fyri sama burturkast fæst í dag kr. 2000,-. Burturkastið kann t.d. vera gamlir radiatorar, súkklur og vaskimaskinur. Koparprísurin er himmalhøgur í løtuni, fyri eitt tons fæst umleið 8000 dollarar, fyri trimum árum fekst 3000 dollarar fyri somu nøgd. Tað er eftirspurningurin í Asiu, og har er serliga talan um Indiu og Kina, sum eru atvoldin til høgu prísurnar, sigur Casper Andersen frá Jyske Bank við blaðið Ingenøren, skrivar joanisnielsen.fo

# Ósemja um fiski-dagar

**Tað hevur verið truplult hjá vinnunevndini at semjast um fiskidagar, nú nevndin hevur havt málið til viðgerðar seinastu dagarnar, og í morgun var ikki líkt til, at nevndin kundi semjast um eitt felags álit til løgtingið**



*Í morgun bendi alt á, at fiskiflotin neyvan sleppur undan eini skerjing í fiskidøgum komandi fiskiár, sum verður minni enn 10%*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIDAGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mangt bendir á, at vinnunevndin, sum seinastu dagarnar hevur havt løgtingsmálið um fiskidagar til viðgerðar, neyvan kemur til sættis um eitt felags tilmæli til løgtingið.

Tað er andstøðan á tingi, ið hevur formannin í vinnunevndini, sum er Jóhan Dahl úr Sambandsflokkinum.

Javnaðarmaðurin Gerhard Lognberg, sum hevur tikið sín stuðul til samgonguna aftur, er eisini í vinnunevndini, og roknað verður við, at hann antin fer at halda seg til tilmælið hjá andstøðuni – ella fer at koma við sínum egna tilmæli um fiskidagar.

Ætlanin hjá formanninum í vinnunevndini er, at nevndin skal verða liðug við sítt arbeiði í dag, og miðjað verður eftir, at álitið ella álitini verða klár einaferð fyrrapartin.

### 10% niðurskurður

Sum skilst, bendir mangt á, at meirilutin í vinnunevndini, sum er andstøðan, fer at mæla til ein niðurskurð í fiskidøgum upp á 10%, bæði fyri trol og húk. Hinvegin eru ábendingar um, at minnilutin, sum eru samgongutinglimirnir, fara at mæla til ein niðurskurð upp á 20%.

Spurningurin er so, um Gerhard Lognberg fer at taka undir við tilmælinum hjá andstøðuni – ella um hann fer at koma við sínum egna tilmæli um fiskidagar.

### Gerhard sítt egna

Um 9.30-tíðina í morgun fingu vit heilt stutt orð á Gerhard Lognberg, sum júst í hesi løtu sat á fundi í vinnunevndini.

Vit spurdu hann, um hugsandi er, at tølini, vit hava nevnt um tilmæltar niðurskurðir, fara at halda, segði hann, at nevndin ikki var liðug við arbeiði enn. Tó helt hann tað ikki vera óhugsandi, at hetta verða tølini.

- Men eg fari ikki at taka undir við so stórum niðurskurðum í fiskidøgum, hvørki við 20%, ei heldur við 10%, segði hann.

Hugsandi er tí ikki, at tað verður ein samd vinnunevnd, sum kemur við áliti í morgun, men ein nevnd, sum helst fer at býta seg í ein meiriluta og tveir minnilutar – ella um tríggjar minnilutar.

### Alt í óvissu

Sosialurin hevur skilt, at Gerhard Lognberg fer ikki at taka undir við eini skerjing av fiskidøgum, sum er meira enn 2%, og tað skal undra mangan, um Heini O. Heinesen fer at taka undir við eini skerjing upp á 20%.

Livst, so spyrst.

Nógvir leikir eru í longum talvi, og soleiðis er eisini í politikki.

Tí er slett ikki vist, at nakað av hesum, ið vit her hava ført fram, fer at halda, tá samanum kemur.

Tað, sum eisini kann henda, er, at ein størri partur av vinnunevndini áðrenn fundarlok fer at semjast um okkurt heilt annað prosenttal, um hetta samstundis kann gerast grundarlag undir eini breiðari semju.

# Toskaveiða til húsbrúks í Ný Foundlandi

**Eingin vinnulig toskaveiða hevur verið við Ný Foundland seinastu 16 árini. Nú hava fólk loyvi at veiða 15 toskar í part til húsbrúks í einum ávísum tíðarskeiði**

NÝ FOUNDLAND

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki verið loyvt at fiska tosk við Ný Foundland síðan 1992, tá toskurin hvarv. Nú er kortini loyvt aftur í ávísum tíðarskeiði at fiska tosk til húsbrúks. Talið av toski í loyvdu veiðini er 15 fyri hvønn luttakara.

Mikudagin, tá loyvt var at veiða tosk aftur, loystu fleiri hundrað bátar í Ný Foundlandi og løgdu út á hav.

Men tað eru ikki øll, sum eru eins fegin um, at avmarkað toskaveiða til húsbrúks er loyvd.

Framvegis er lítil toskur við Ný Foundland, og umhvørvisfólk halda tað ikki vera rætt at loyva veiði eftir toski til húsbrúks heldur.

Hóast vinnulig toskaveiða við Ný Foundland varð steðgað í 1992, er toskurin enn ikki komin aftur á sínar traditionellu leiðir.

Nú er so loyvt at veiða í mesta lagi 15 toskar í part fram til 27. september.



*Á myndini sæst, hvar Ný Foundland liggur. Nógvir føroyingar fiskaðu tosk á hesum leiðum*